# Viking afturkallar bjargingarvestar



*Tað er umráðandi, at trygdin á sjónum er í lagi. "Tygara tryggleiki er okkara fremsta mál...", sigur Viking Life-Saving Equipment. Myndin er tilvildarlig*

**- Okkara fremsta mál er tygara tryggleiki. Tí afturkalla vit bjargingarvestarnar, Mariner PV9270 og Mariner PV9271, sigur Hanne Svarer Schwensen, sum starvast á fyritøkuni, Viking Life-Saving Equipment**

AFTURKALLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Viking Life-Saving Equipment, sum er ein kendur framleiðari av bjargingarútgerð, boðar nú frá, at fyritøkan afturkallar tvey sløg - ella vørunummur - av bjargingarvestum, sum fyritøkan hevur framleitt.

Talan er um vestarnar, sum bera numrini, PV9270 og PV9271.

Í skrivi, sigur Hanne Svarer Schwensen, ið starvast hjá Viking, at fyritøkan hevur staðfest, at Mariner PV9270 og Mariner PV9271 í nøkrum fáum førum ikki folda seg rætt út úr betrekkinum.

- Hetta kann í ringasta føri elva til, at rúmið í vestunum, sum skal blásast upp, spreingist.

Hanne sigur, at umrøddu vestar eru framleiddir í tíðarskeiðinum, 1. januar 2002 til 15. juni 2004.

### Ber útreiðslurnar

- Uttan mun til, hvussu lítil vandin fyri breki við uppblásing er, hevur Viking gjørt av at afturkalla allar vestarnar av hesum slagi.

Fyritøkan heitir tí á øll, sum hava keypt hesar bjargingarvestarnar, um at senda teir aftur til Viking Life-Saving Equipment, sum átekur sær allar útreiðslurnar av sendingini.

Viking sigur, at tey fara at broyta nevnda betrekk til tess at umgangast møguligar trupulleikar við vestunum í framtíðini.

### Tín tryggleiki

- Vit harmast um tað stríð, sum hetta hevur við sær, men eru samstundis vís í, at tygum skilja tað neyðuga í hesum tiltaki.

Í fráboðanini verður lagt aftrat, at útgerð hjá Viking altíð skal vera í lagi, tí "tygara tryggleiki er okkara fremsta mál...", sum Hanne Svarer Schwensen málber seg.

Gummibátatænastan:

# Hevur ikki hasar bjargingarvestarnar

**- Eg dugi ikki at meta um í hvønn mun, bjargingarvestar av nevndu sløgum, sum nú verða afturkallaðir, eru seldir í Føroyum, sigur Gummibátatænastan, sum í gjár ikki hevði sæð fráboðanina frá Viking Life-Saving Equipment**

BJARGINGARVESTAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eftir fráboðanina hjá Viking Life-Saving Equipment um at afturkalla tvinni sløg av bjargingarvestum, nevniliga Mariner PV9270 og Mariner PV9271, vendu vit okkum til Gummibátatænastuna fyri at vita, um fleiri av nevndu vestum eru seldir í Føroyum.

Á Gummibátatænastuni høvdu tey ikki sæð fráboðanina, tá ið vit frættu, men tey søgdu seg vilja kanna málið beinanvegin.

Vit lósu numrini á nevndu bjargingarvestum upp fyri teimum, men líkt er ikki til, at Gummibátatænastan hevur hesar vestar, sum eru framleiddir í tíðarskeiðinum, 1. januar 2002 til 15. juni 2004, á goymslu.

- Vit hava eitt slag av bjargingarvestum, sum hevur numrini, PV9274, og tað er tað nærmasta, eg síggi nevndu sløgum.

Men tað er so ikki hetta slagið, sum Viking Life-Saving Equipment nú afturkallar.

### Ljós og refleks

Á Gummibátatænastuni siga tey, at ein stórur partur av bjargingarvestunum, sum seldir eru føroyskum skipum, hava vørunummarið, PV95001002.

- Hesir eru góðkendur av Skipasýninum, og teir eru eisini Solas-góðkendir. Hesir vestar hava bæði ljós og refleks, siga tey.

Á Gummibátatænastuni halda tey, at bjargingarvestarnir, sum Viking umrøður og afturkallar, helst eru ætlaðir stuttleikabátum og frítíðarvirksemi.

- Men hetta fara vit nú at kanna, siga tey á Gummibátatænastuni í viðmerking.

# Góð bjargingarútgerð hevur bjargað mongum manni

BJARGINGARÚTGERÐ
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Var bjargingarútgerðin ikki í lagi, bóru teir ikki boð í bý*

*Mynd: Leivur Nygaard*

Eingin ivi er um, at bjargingarvestar og yvirlivilsisdraktir hava bjargað mongum manni á báti. Ein hending av slíkum slagi var í Suðuroy fyrr í heyst, tá ið útróðrarbátur við tveimum monnum umborð sigldi á land undir Suðuroynni.

Stundum vóru báðir menninir í bátinum og stundum flutu teir við síðuna av bátinum - í yvirlivilsisdrakt.

Bátseigarin segði tá við Sosialin, at høvdu teir ikki verið í draktini, bóru teir ikki boð í bý.

Sama er við bjargingarvestum, sum er tað fyrsta, ein útróðrarmaður eigur at tryggja sær er í lagi, tá ið hann loysir frá landi.

Tað er at fegnast um, at ábyrgdarfullir framleiðarar av bjargingarútgerð gera vart við seg, um tað vísir seg, at útgerðin ikki er 100% soleiðis, sum hon eigur at vera.

# Bilar á flogvøllinum skulu hava vaktarmenn

**Langtíðarparkeringsøkini vesturi á flogvøllinum eru so at siga liðug, og tey verða nú boðin út. Umframt langtíðar parkering, skulu bileigarar eisini hava møguleika at fáa ymiskar tænastur veittar á flogvøllinum**

ÚTBJÓÐING
*eydna@sosialurin.fo*

– Parkeringsøkini eru nú so at siga liðug. Tað einasta, sum ivamál nú er um, er um onkrar innhegningar rundan um parkeringsøkini. Annars er klárt, og tað er eisini í tí sambandi, at parkeringsøkini nú verða útbjóð-að, sigur Oyvindur Brimnes, Landsverkfrøðingur.

Uppgávan hjá útvalda umsøkjarunum verður at passa bilarnar og halda vakt yvir teimum 24 tímar um døgnið, ímeðan fólk eru burturi.

– Felagið, sum fær arbeiðið, skal hava fólk á staðnum alt samdøgrið. Tað skal eisini kunna veita ymiskar tænastur, sum til dømis at fylla luft í dekkini og geva streym. Tílíkar tænastur kunnu teir so taka seg betaltar fyri. Tað verður løn beint niður í teirra egnu lummar, greiðir Landsverkfrøðingurin frá.

Søkt verður í Føroyum, men útlendsk vaktar- og tænastufeløg hava eisini møguleika at bjóða.

### 24 januar

Freistin at søkja um rakstrurin og arbeiðið av langtíðarparkeringsbásunum er sett at vera 24 januar kl. 15.

– Vit ætla sjálvsagt at tænastan skal koma í gildi so skjótt sum gjørligt. Júst nær tað verður er tó ilt at siga, tí vit fara ikki bert at velja tann bíligasta bjóðaran. Tænasturnar, ið hann kann veita og støðið á vaktarhaldinum verða eisini tikin við í metingarnar, greiðir Oyvindur Brimnes frá.

Av hesi orsøk fer tað allarhelst at taka nakrar dagar at velja ein arbeiðstakara burturúr umsøkjarunum, sigur landsverkfrøðingurin at enda.